# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# MONARKI I RØG OG DAMP

Hóast gott og væl hálvonnur øld er liðin, síðani kongsins einaveldi fall, og Danmark fekk grundlógina, so hava vit framvegis sokallað konstitutionelt monarki – eina stýrisskipan, har vit hava ein monark, sum er bundin av grundlógini og so at siga einki politiskt vald hevur – er faktiskt bara til pynt.

Tað er so hugaligt at fáa kongaliga vitjan – og tað fingu vit í gjár, tá Margreta drotning og Hendrikkur prinsur komu á vitjan. Og tey skulu vera hjartaliga vælkomin. Drotningin kann gleða fleiri fólk, sum sleppa at heilsa upp á hana – og onnur njóta eisini gott av kongsvitjanini, tí um ikki annað, so verður lokala umhvørvið fríðkað til høvið.

Hinvegin kunnu vit seta spurnartekin við, um nøkur meining er í at hava ríkið skipað við konstitutionellum monarki. Onnur framkomin lond hava ein forseta í staðin. Hesa skipan kenna vit eitt nú í Íslandi og í Finnlandi. Tey eru eisini glað fyri sín forseta - og verða tey troytt av honum, so sleppa tey at skifta hann út. Men tað sleppa vit ikki.

Nú drotningin vitjar, so fáa okkara kosnu fólk frið eina løtu – sleppa frá at stríðast um sparingar og skerjingar – og kunnu kenna seg væl í góðum selskapi í nakrar dagar. Hinvegin so kunnu vit ikki lata vera við at seta spurningin: Hvussu nógv kostar hetta? Man hendan drotningavitjanin ikki kosta føroyskum og donskum skattgjaldarum gott og væl javningina av fólkapensjónini fyri næsta ár, sum landsstýrið hevur stungið út í kortið? Ella sparingar á skúlaøkinum?

Alt er sjálvandi ein spurningur um prioritering. Men ikki bara tað. Vit hava jú eitt demokrati, sum fyrr í mánaðinum kundi hátíðarhalda 161 ára dagin fyri grundlógini. Hvussu ber tað so til, at vit øll - frá afturhaldssinnaðum sambandsfólki til víðgongd tjóðveldisfólk - leggja okkum fløt fyri monarkinum?

Drotningin hevur eisini hesaferð heiðrað fólk - bæði vanlig fólk, sum fáa heiður fyri trúgva og drúgva



tænastu, men eisini tey, sum fáa sítt bringuprýði, tí tey av tilvild røkja eitt ávíst starv, nú drotningin er her. Tjóðvelidsfólk og javnaðarfólk – næstan øll altso – takka vanliga per prinsipp nei til riddarakross. Tað er sjálvandi ein rørandi heiður, tá ovasti monarkurin pyntar tær bringuna soleiðis, men álvaratos... Hvat er poengið? Er tað fyri at politikararnir skulu vera betri politikarar, ella er tað tí, at teir skulu verða fittari við kongshúsið? Monarki er í øllum førum ikki demokrati. Tað áttu vit sum framkomið fólkaræði at respekterað.

**Onnur framkomin lond hava ein forseta**

---

# Anna syngur í SMS



Hósdagin vitjar føroyska songkvinnan Anna Nygaard í SMS í Havn. Hon verður gestur í sendingini Baresso, sum Rás2 sendir millum klokkan 15 og 17, og hon fer at syngja nakrar sangir á Torginum í SMS.

Anna Nygaard gav fyri kortum út fløgu í Danmark, og hon hevur verið nógv at sæð í donskum miðlum seinastu tíðina. Anna hevði eisini tvær konsertir í Føroyum í mai mánaði, men hetta er fyrstu ferð, at hon framførir live í Føroyum, síðani nýggja fløgan kom út.

Prátað verður við Annu Nygaard um nýggju útgávuna og avbjóðingarnar, sum liggja fyri framman.

Kokkurin Uni Gullfos fer at grilla á parkeringsøkinum hjá SMS, og eisini verður okkurt undirhald til børnini.

Rás2 sendir Baresso sendingina millum klokkan 15 og 17.



## Neistahøll í Vesturbýnum

JÓGVAN ARGE
KJAK Á SÍÐU 34



## Standmynd av sjólátnum

ANN MIKKELSEN
KJAK Á SÍÐU 35



# Elton John á pallin klokkan sjey

Týskvøldið verður stóra konsertin við Elton John á Tórsvølli. Seinastu dagarnar hevur verið gjørt klárt til konsertina, og nú manglar bara høvuðspersónurin sjálvur at koma til landið.

Dyrnar á Tórsvølli lata upp klokkan hálvgum seks týskvøldið, og klokkan sjey sessast Elton John við klaverið og fer at spæla í tveir og ein hálvan tíma.

Hetta er solokonsert hjá Elton John, og roknað verður sjálvsagt við, at hann fer at tríva í nógvar av sínum kendu sangum.

Rás2 hitar upp til Elton John konsertina allan týsdagin. Sent verður av Tórsvølli fyrrapartin millum klokkan 9 og 11, og aftur seinnapartin frá klokkan 15. Sent verður til konsertin byrjar, og Rás2 fer at varpa fyrsta partin av konsertini beinleiðis út til allar føroyingar.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*